# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- McCain vil hava meg til Irak saman við sær, men eg ætli mær sjálvur at vitja okkara hermenn har*
*Barrack Obama*

# Søgulig avtala um vápnabann



*Ein tyssibumba er ein bumba við millum 40 og 60 smáum bumbum ella granatum. Tær smáu bumburnar bresta, tá tær raka okkurt hart, men nógvar verða liggjandi og hava ofta kravt ósek mannalív. Á myndini sæst ein ísraelsk tyssibumba, sum er funnin í Libanon*
*Mynd: Polfoto*

**Eftir at hava togast aftur og fram í tíggju dagar eru umboð fyri 109 lond vorðin samd um banna teimum sokallaðu tyssibumbunum**

Umboðini úr teimum 109 londunum, sum hava tingast í Dublin teir seinastu 10 dagarnar, samdust í gjárkvøldið um eitt uppskot, sum írski samráðingarleiðarin, Dáithi O'Callaigh, hevði lagt fram fyrr í gjár. Uppskotið er ikki eitt fullkomið bann ímóti teimum illa gitnu tyssibumbunum, men bannar londum at brúka hesar bumbur í kríggi. Samstundis áleggur avtalan londum at beina fyri sínum tyssibumbum sum skjótast og at rudda økir, har hesar bumbur liggja.

Tað leikaði hart á, áðrenn semja fekst. Fleiri lond í Afrika vildu hava eitt fullkomið bann, og fleiri lond í Vesturheiminum royndu at útseta gildiskomuna. Tað var serliga Bretland, sum lá í buktini. Bretska sendinevndin kravdi at fáa fleiri undantøk inn í avtalutekstin, men mikudagin slepti sendinevndin øllum krøvunum eftir beinleiðis boðum frá Gordon Brown, forsætisráðharra.

- Hendan avtalan verður eitt stórt framstig og er grundað á, at Bretland hevur gingið á odda í stíðnum ímóti landminum, segði Brown, sum samstundis upplýsti, at bretska herváldið hevur fingið forboð fyri at brúka øll vápn, sum koma undir tað nýggja bannið.

Nú skulu tey einstøku londini staðfesta avtaluna, sum verður endaliga undirskrivað í Oslo í desembur.

# Ætlar at ganga tvørtur um Reyðahavið

**Tarik bin Laden, sum er beiggi tann navnframa Osama bin Laden, ætlar sær at ganga í fótasporum Mósesar**

Eingin hevur gingið tvørtur um Reyðahavið, síðani Móses gjørdi tað á sinni, men nú ætlar eitt felag í Dubai at gera eina brúgv úr suðurendanum á Jemen til Djibouti. Brúgvin verður 29 kilometrar lomng, og kostnaðurin verður sagdur at vera einastaðni millum 50 og 100 milliardir krónur.

Hugskotið um fast samband tvørtur um Reyðahavið kemur frá einum felagi í Dubai, og høvuðsmaður aftan fyri tað er Tarik bin Laden. Hann er beiggi Osama bin Laden, men valdi eins og hini í ættini at kvetta alt samband við Osama, tá hann fór í hernað ímóti USA og kravdi saudiarabisku kongsættina frá.

- Tarik hevur hugsað um brúnna í mong ár, sigur sakførari og ráðgevi hansara, Jameel Murshed, við AP.



## STUTT SAGT

### Ísland fordømir Guantanamo

Herfyri legði flokkurin Vinstra-grønir eitt uppskot fyri Altingið, har flokkurin mælti til, at Ísland skal fordøma tað, sum hendir í fangaleguni Guantanamo, og at USA skal lata leguna aftur alt fyri eitt. Nú hevur uttanríkisnevndin hjá Altinginum viðgjørt uppskotið, og eftir at hava broytt orðalagið eitt sindur mælir nevndin Altinginum til at samtykkja uppskotið. Tað ber í sær, at tingið heitir á stjórnina og biður hana fordøma ta vanvirðandi viðferð, sum fangar hava fingið í Guantanamo-leguni, og at amerikonsku myndugleikarnir eiga at lata leguna aftur sum skjótast. Uttanríkisnevndin sigur seg skilja amerikanska bardagan ímóti yvirgangi, men sigur, at ein tílíkur bardagi kann ikki seta mannarættindini til viks.



*Ísland vil hava USA at lata Guantanamo-leguna aftur*
*Mynd: Reuters*

### Verja oljuna

Samerindu arabisku fúrstadømini við Persaflógvan fara nú at tingast við amerikonsku vápnaverksmiðjuna Lockheed Martin um eina felags skipan, sum skal verja londini ímóti rakettálopum. Talan er um eina sera framkomna skipan, og kemur handilin í lag, skulu fúrstadømini rinda umleið sjey milliardir dollarar fyri verjuskipanina. Tað er tó ein treyt, at amerikanska herleiðslan góðkennir handilin. Amerikanska verjan hevur bílagt somu skipan frá Lockheed Martin og fær hana væntandi næsta ár, skrivar AP.